# Óheft at stýra skuldini

**Tjóðveldi hevur lagt eitt uppskot til samtyktar fyri Løgtingið, sum snýr seg um, at nú skal verða gjørligt hjá fólki við skuld at fáa óhefta ráðgeving við skuldini. Sum er, eru tað bara privat við egnum áhugamálum, ið ráðgeva**

SKULDARSTÝRING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tá hjólini mæla eitt sindur seinni í samfelagnum, og summi vilja vera við, at tað er kreppa, so gerst tað munandi tyngri at hava skuld. Skuld, sum varð uppbygd, tá hjólini mólu heilt skjótt, og bankar og onnur veittu lán fyri eitt gott orð.

Tá fyritøkur við áhugamálum skulu umsita skuldina hjá tær, tá vilja tær í allar flestu førum verja seg sjálvan fyri tapi. Hetta kann ganga útyvir skuldaran.

Hetta hevur Tjóðveldi eitt uppskot til at broyta, við at seta eina óhefta skuldarráðgeving á stovn, ið skal virka á sama hátt sum rættarhjálpin, ið kann hjálpa fólki, sum eru komin illa fyri, ella sum hava tørv á vegleiðing.

- Sum er hava vit ongan óheftan, ið kann ráðgeva fólki, sum hava fingið eina skuld, og tí leggja vit hetta uppskotið fram, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi. Hann leggur afturat, at henda tænasta ikki skal kosta so nógv – lítið meira enn eina millión – tí ætlanin er ikki at hava eina stóra umsiting av hesum.



*Stendur tað til Tjóðveldi, so verða tað í framtíðini ikki bert fyritøkur, sum bankar við egnum áhugamálum, ið veita kundaráðgeving*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Verja brúkaran

Í uppskotinum vísir Tjóðveldi á, hvussu lænimøguleikarnir eru broyttir seinastu árini, soleiðis, at tað er sera torført hjá vanliga kundanum at skilja, hvat í veruleikanum gongur fyri seg.

- Tjóðveldi heitir á Landsstýrið at skipa eina óhefta skuldarráðgeving til privatfólk og familjur, har til ber at fáa ókeypis ráð og vegleiðing um lánsmarknaðin, skuldarumlegging, umfigging og aðra hjálp til tey, ið eru komin í stórar trupulleikar av privatlánum, stendur millum annað í uppskotinum.

## Rokna við undirtøku

- Uppskot frá andstøðuni verða sjáldan tikin veruliga upp av samgonguni, men eg meti, at hetta uppskotið er so mikið skilagott, at hetta kanska fær undirtøku, sigur Høgni Hoydal. Sum leggur dent á, at hetta sampakkar væl við uppskot uttanlands, umframt, at hetta er í tráð við politikkin við brúkaraumboði.

## Í prinsippinum ímóti

Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri, er í prinsippinum ímóti, at útbyggja almennar stovnar í eyst og vest, sum hann nevnir tað, og hann heldur somuleiðis, at tey flestu burdu havt skil fýri sínum privatøkonomisku viðurskiftum.

- Eg haldi, at ein og hvør persónur, við sínum fullu fimm, sjálvur skal vera førur fyri at stýra sínum fíggjarligu viðurskiftum, sigur Jóhan Dahl, sum ivast stórliga í, hvat hetta skal hjálpa, tí vit hava longu sakførarar og grannskoðarar, ið tað ber til at heita á. Tó tekur hann undir við, at tað eru fólk, ið kanska ikki hava útbúgvingar, sum kunnu koma í trupulleikar og ikki hava ráð til grannskoðarar og sakførarar, men vinnumálaráðharrin heldur ikki, at tað er rætt brúktur pengingur at útbyggja almennar skipanir til hetta endamál.

# Íslendskir læknar rýma av landinum

**Nógvir íslendskir læknar fara av landinum at arbeiða, og eftirspurningurin er stórur. Íslendska læknafelagið ávarar nú politikararnar**

ÍSLAND
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Gunnar Ármannsson er stjóri í íslendska læknafelagnum (Mynd: Vísir)*

Íslendskir læknar eru eftirspurdir í hinum Norðurlondunum. Herfyri vendi tann danska sendistovan í Reykjavík sær til tað íslendska læknafelagið, tí sendistovan vildi hava at vita, hvussu hon kundi fáa samband við íslendskar læknar. Í fjølmiðlunum hava norskir heilsumyndugleikar lýst eftir íslendskum læknum, og sviar hava eisini sýnt íslendsku læknunum áhuga. Tað seinasta er, at fyri stuttum kom eisini ein fyrispurningur úr Kanada um íslendskar læknar.

Íslendska læknafelagið hevur ikki eggjað sínum limum at fara av landinum at arbeiða, men teir læknar, sum hava vent sær til felagið og biðið um upplýsingar um viðurskiftini uttanlands, hava fingið tað, teir hava biðið um. Men nú er støðan broytt.

– Vit hava dømi um, at læknar, sum júst eru komnir heim eftir lokna serútbúgving uttanlands, eru farnir avstaðaftur. Vit hava kunnað bæði undanfarna og núverandi heilsumálaráðharran og aðrar heilsumyndugleikar um hetta, sigur stjórin í íslendska læknafelagnum, Gunnar Ármannsson, við blsðið Vísir.

## Nógvir eldri læknar

Svarið frá myndugleikunum hevur sambært stjóranum verið, at eingin vandi er á ferð, og at tað er ein samfelagslig skylda hjá læknunum at arbeiða í Íslandi.

– Men nú er tað vorðið so, at vit hava dømi um, at læknar eru uppsagdir orsakað av sparingum. Vit hava hoyrt menn siga, at íslendskir læknar eru ikki teir, sum stinga í sekkin. Men læknar eru eisini fólk, og tá korini versna, noyðast teir at hugsa um familjuna,. sigur stjórin hjá læknunum.

Gunnar Ármannsson vísir á, atíslendskir læknar, sum hava fingið sær serútbúgving í øðrum landi, hava ógvuliga lætt við at fáa arbeiði í tí landinum. Eitt úrslit av hesum er, at í fleiri av teimum stóru sergreinunum er meðalaldurin á læknunum í íslendska heilsuverkinum so høgur, at teir flestu hava bara eini tíggju ár eftir, til teir verða pensjoneraðir.

– Okkum tørvar fólk til at fylla hesi plássini, men tað fáa vit ikki, og støðan kann gerast álvarssom, sigur stjórin í íslendska læknafelagnum við Vísir.



*Meðalaldurin á læknunum í Íslandi er høgur (Mynd: Morgunblaðið)*